

## Helena ger rætt

Kristina Háfoss er púra sannførd um at Helena Dam á Neystabø ger rætt, nú hon eftirmetir støðuna við Kringvarpinum. Hinvegin tekur fyrrverandi landsstýriskvinna á seg, at landsstýrisfólkið hevur evstu ábyrgd á kringvarpsøkinum og undrast als ikki yvir, at spurningurin um Kringvarvarpslógina, er settur. - Stýrið fyri Kringvarpinum er suverent, tí mann skal halda Kringvarp og landsstýrið atskild. Hinvegin er tað altíð landsstýrisfólkið, ið hevur evstu ábyrgd, sigur Kristina Háfoss. Hon leggur afturat, at sum hon hevur skilt málið, er talan um eina óhepna orðing, sum kann skiljast á ymiskan hátt. - Stýrið í Kringvarpi Føroya hevur nýtt løgfrøðing, og løgfrøðingur hjá mentamálaráðnum hevur eftirkannað málið, og løgfrøðiliga bar til at skilja lógina soleiðis, at tað ber til at gera sum Kringvarpið ger. Spurningurin er bara, um tað er politiski viljin, greiðir Kristina Háfoss frá.

# Kringvarpið fylgir ikki lógini

**Hans Túgvi Teirin, ið er løgfrøðingur, metir ikki at Kringvarpið arbeiðir samsvarandi við kringvarpslógina. Hann dugir ikki at síggja, at ein tíðindaleiðari kann vera fyri tvær sjálvstøðugar eindir**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




Í lógini um Kringvarp, frá 16. mai. 2006, stendur soleiðis: »Stjórin ger uppskot til stovnsbygnað, sum stýrið staðfestir, tó so at tað til eina og hvørja tíð skulu vera tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir.«

Júst hetta dugir Hans Trúgvi Teirin ikki at síggja, at Kringvarpið arbeiðir í tráð við.

- Sum eg lesi lógina, er tað soleiðis, at mann skuldi keypa tvær kanónir og tveir offiserar at skjóta við teimum. Soleiðis sær tað ikki út til at vera. Tað sær út sum, at tað er ein offiserur, sum skjýtur við báðum kanónunum, sigur Hans Trúgvi Teirin.

### Tað er onki sum verjir tað

Hans Trúgvi Teirin greiðir frá, at tað hann heldur ikki dugir at finna nakað í viðmerkingunum, ið verjir valið Kringvarpið hevur gjørt.

- Tað einasta eg dugi at síggja í viðmerkingunum, er ein enn størri staðfesting av, at lógin skal skiljast sum, at tað skulu vera tvær púra óheftar deildir. Tað er torført at ímynda sær, um mann hevur eina leiðslu, sum svansar alt í ein ellubita, greiðir løgfrøðingurin frá.

*Tað er serstakliga ivasamt um Kringvarpið fylgir Kringvarpslógini, siga løgfrøðingar Sosialurin hevur tosað við*

### Bara á pappírinum

Hinvegin skilur Hans Trúgvi Teirin eitt sindur hvussu Kringvarpið hevur gjørt.

- Tey kunnu kanska verja tað tey gera, men so er tað bert á pappírinum. Soleiðis sum tað sær út til at virka í praksis, kundi tað, tað sama verið ein tíðindaeind og ikki fleiri. Tí eg fái tað øgiliga illa at sampakka, at tað er ein leiðari á báðum deildunum.

Løgfrøðingurin leggur afturat, at tað í hesum føri er talan um eina beinleiðis avmarking í eini lóg, og tí er tað rættiliga týdningarmikið, at hon verður fylgd.

Sosialurin hevur tosað við tveir aðrar løgfrøðingar, og sum skilst eru teir púra samdir við Hans Trúgva Teirin.

Hinvegin veit Sosialurin eisini, at løgfrøðingar hava kannað skipanina hjá Kringvarpinum, so ymiskar tulkingar eru helst av lógini.

# Alt er sama reiðarí

**Jón Brian Hvidtfeldt, tíðindaleiðari í Kringvarpinum, dugir illa at skilja, at málið um tvær eindir skal takast so nógv upp nú. – Dagliga hava vit tvær redaktiónir, men vit arbeiða øll í Kringvarpinum, sigur Jón Brian Hvidtfeldt**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosilurin.fo*

Jón Brian Hvidtfeldt er settur sum tíðindaleiðari í Kringvarpinum. Hann hevði sín fyrsta arbeiðsdag 1. oktobur, men nú er rok um starvið hjá honum, tí tað bert er ein leiðari fyri tíðindini hjá Kringvarpinum.

- Uppgávan hjá mær er at syrgja fyri at tíðindini, sum fara út, eru í ordan. Samstundis skal eg syrgja fyri, at deildin hongur saman, og tað vildi verið spill av resursum, um vit ikki arbeiddu saman í ávísum førum. Vit hava, fyri at fylgja lógarkravinum, skipað okkum í tvær óheftar redaktiónir, sum hava hvør sín redaktør hvønn dag. Hinvegin dugi eg ikki at skilja lógarkravið, tí gomlu eindirnar kunnu í veruleikanum ikki kappast. Útvarpið hevur tíðindir fleiri ferðir um dagin, meðan sjónvarpið bert hevur fýra tíðindasendingar um vikuna, og tí dugi eg ikki at síggja, hví tað skal vera eitt argument, at eindirnar skulu kappast, tá restin av lógarverkinum fyri Kringvarpið snýr seg um samstarv, sigur Jón Brian Hvidtfeldt.

### Fer at sparra við redaktørarnar

Spurningurin er seinni settur, hvat tíðindaleiðarin kann gera, um hann ikki sleppur at blanda seg, í hvørji tíðindir fara út.

- Eg fari sjálvandi at sparra við redaktørarnar. Eg kann ikki sita í eini krystalkúlu og goyma meg. Tað hevði eisini verið absurd, um eg skuldi rýmt úr rúminum, tá redaktiónsfundir eru. Eg segði eisini til setanarsamrøðuna, at eg fegin vildi halda áfram at gera tíðindi, og tað ætli eg mær, greiðir nýggi tíðindaleiðarin í Kringvarpinum frá.

### Fólkini fara at skifta

Jón Brian Hvidtfeldt greiðir frá, at fólkini á tíðindadeildini sjálvandi fara at skifta ímillum at gera sjónvarp og útvarp.

- Tað ber ikki til, at tað skal vera eitt so vatntætt skott ímillum sjónvarpið og útvarpið, nú tey øll eru í sama reiðaríið. Deildirnar eru báðar so lítlar, at vit mugu flyta fólk ímillum. Og ætlanin er sjálvandi eisini, at starvsfólkini skulu hava møguleika at skifta ímillum, tí tað er mennandi fyri tey, greiðir tíðindaleiðarin frá.

### Politikararnir eru óseriøsir

Jón Brian Hvidtfeldt metir, at tað politikararnir gera, er at skapa ein kunstigan trupulleika.

- Eg dugi ikki at skilja argumentatiónina. Eindirnar eru so lítlar, at vit nevniliga kunnu fáa ein einsporaðan tíðindaflutning, um vit ikki nýta resursurnar hjá hvørjum øðrum. Úrslitið verður, at vit ikki røkka nøkrum sum helst. Tað er óseriøst av politikarum, sum vita alt um málið, at teir nú skulu seta spurnartekin við tað sum hendur. Bæði Jógvan á Lakjuni og Bjørn Kalsø hava, saman við restini av táverandi Mentanarnevnd hjá løgtinginum, verið á fundi við Kringvarpið. Tað var 16. mai, áðrenn lýst varð eftir nýggjum deildarleiðarum. Har vóru tey kunnað um nýggja bygnaðin og har varð eisini umrøtt, hvussu kringvarpslógin skal tulkast í hesum sambandi. Somuleiðis hevur Mentamálaráðið gókent nýggja bygnaðin. Tískil hava politikararnir havt allan møguleika at seta seg inn í málið, sigur Jón Brian Hvidtfeldt.

# Vit hava onki skeivt gjørt

**Formaðurin í Kringvarpsstýrinum er ikki í iva um, at Kringvarpið onki skeivt ger við at hava ein tíðindaleiðara í Kringvarpinum. – Uppgávan er ikki at mynda tíðindini, men at organisera tey, sigur Rúni Heinesen**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Rúni Heinesen er formaður í Kringvarpsstýrinum. Í gjár beitti hann Sosialin víðari til stjóran í Kringvarpinum, men í dag loysir hann posabandið.

- Vit hava onki skeivt gjørt. Í framtíðini skulu vit hava heili tríggjar redaktiónir, sum skulu arbeiða óheft og sjálvstøðugt, hvør av aðrari. Mentamálaráðið er kunnað um málið og tey hava onki sagt um at vit gera nakað skeivt, sigur Rúni Heinesen

### Ein tíðindaleiðari

Tá ein tíðindaleiðari er settur til tríggjar redaktiónir, er nærliggjandi at hugsa, hvørja uppgávu hesin tíðindaleiðarin skal hava, um eindirnar skulu vera sjálvsstøðugar.

- Uppgávan hjá tíðindaleiðarinum skal vera at býta út og organisera. Hann skal ikki stýra innihaldinum, tí so fáa vit einsporaðan tíðindaflutning, og tað er ikki ætlanin við lógini. Eisini skal tíðindaleiðarin syrgja fyri, at eindirnar eru óheftar og, at kringvarpið framleiðir tíðindi. Eg eri ovast í pyramiduni í hesum føri, og tí veit eg ikki heilt, hvørjar aðrar uppgávur tíðindaleiðarin hevur, men tað ber til at spyrja hann, greiðir Rúni Heinesen frá.

### Tað er politikkur

- Tað er eitt politiskt val, at stovnarnir skuldu leggja saman, við tí í huga at spara pening. Vit hava havt fundir bæði við mentanarnevndina hjá tinginum og við mentamálaráðið, har tey onki hava sagt um okkara hátt at skipa virksemið, og vit hava verið heilt opin kring allar ætlanirnar, sigur Rúni Heinesen um viðmerkingarnar ymiskir politikarar høvdu í blaðnum í gjár.